# **Gjáargarður**, staðið uttanfyri Havnina



**Tá tað snýr seg um tilboð til ferðamannin, ella familjuna, so er Gjáargarður óivað eitt hitt besta boðið, tá ein skal njóta løtuna í vøkrum og friðarligum umhvørvi**

**HANDIL**
**Dagfinn Olsen**
dagfinn@sosialurin.fo

Á Gjáargarði við Gjógv býta tey virksemið í tveir partar, nevniliga summar og vetur.

Á vetri er mest skeiðvirksemi og tílíkt, og mest eru tað føroyingar, ið vitja.

Eftir páskir byrjar summarið so spakuliga, og tá er blandað virksemi. Men 1. mai kann sigast, at summarvirksemið av álvara byrjar, og parturin av útlendskum ferðandi, ið vitjar, gerst alsamt størri.

## Vaksandi

Á Gjáargarði lata tey væl at, og í mai í ár hevur verið meira gisting, enn somu tíð í fjør.

Ferðafólk, sum koma til Føroya, koma fyri stóran part til Gjáar, tí bygdin liggur væl fyri, er vøkur, og so eru gistingarmøguleikarnir eisni góðir, og hesum syrgir Gjáargarður fyri.

Talan er um ferðafólk, ið koma til Gjáar at búgva í 2 til 3 dagar, meðan onnur hava Gjáargarð sum "heim", meðan tey ferðast kring landið, fyri síðani at venda aftur til Gjáargarð.

Men sjálvandi eru eisini mong ferðandi, ið koma til Gjáar ein dag, og sum á Gjáargarði fáa ein betri bita.

## Bygt út

Fyri einum ári síðani bygdu tey út á Gjáargarði, og ein lon við fleiri sera góðum – ein kundi sagt luksus – kømurum varð bygd. Køkur er ikki, men annars eru hesi kømur sum íbúðir við egnari inngongd o.s. fr, og er góðskan sera góð.

Og síðani í fjør hava hesi eisini verið at kalla umbiðin alla tíðina.

Annars lata tey á Gjáargarði væl at, og bókingin í ár er á leið tann sama, sum í fjør.

Hvørt kvøld klokkan 18 er døgurði á Gjáargarði.

## Tilboð til familjuna

Gjáargarður hevur eitt gott tilboð til familjuna.

Tvey vaksin og tvey børn kunnu gista í tvær nætur fyri 1795 krónur, og hetta er við morgunmati.




Summarhús í Føroyum



**Tourist Information/Kunningarstovur:**

**Kunningarstovurnar í Eysturoy**
Runavík, 417060
Fuglafjørður, 737715
www.visiteysturoy.fo

**Kunningarstovurnar í Suðuroy**
Tvøroyri, 372480
Vágur, 733090
www.visitsuduroy.fo

**Kunningarstovan**
Tórshavn, 302425
www.visittorshavn.fo

**Norðoya Kunningarstova**
Klaksvík, 456939
www.visitnordoy.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
Sandur, 361836
www.visitsandoy.fo

**Vága Kunningarstova**
Miðvágur, 333455
www.visitvagar.fo

**www.kunning.fo**



MARK kontórstólur

NÚ ½ prís
kr. 1.000,-

Staravegur 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 55 88 · www.skemman.fo

SKEMMAN
Heldur bíligari